TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 03.06.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt: Bjarni Hammer

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 44/21 | 21/00477-2 | Roknskapur 2020 |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

TVØROYRAR KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 44/21
## 21/00477-2 Roknskapur 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.06.2021 | 38/21 |
| 2 Býráðið | 03.06.2021 | 44/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 01.06.2020)**
Borgarstjórin, Fíggjarleiðarin og Kommunustjórin hava gjøgnumgingið roknskapin fyri Tvøroyrar kommunu 2020, sum er grannskoðaður av Løggilda grannskoðaravirkinum Januar, Óðinshædd 13, 110 Tórshavn.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Býráðið skal eisini taka støðu til val av grannskoðara. Greinin er soljóðandi: *"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".*

**Niðurstøða av framdu grannskoðanini – grannskoðanarátekning**

5. Grannskoðanin av ársfrásøgnini hevur ikki givið orsøk til atfinningarsamar viðmerkingar. Um so er, at kommunustýrið góðkennir ársroknskapin í verandi líki, geva vit honum eina grannskoðanarátekning uttan tillagingar og áherðslur.

   Harumframt hava vit í samsvari við § 10, stk. 7, í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl. kannað eftir, at upplýstu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøku tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi, og hava vit gjørt eina átekning uttan vissu í hesum sambandi.

6. Grannskoðanin er farin fram í mai 2021. Allir postar eru gjøgnumgingnir.

9. Í fíggjarætlanini fyri 2020 varð roknað við einum halli á 21.878 tkr. Ætlanin var at niðurrinda skuld við 3.377 tkr., og at aðrar fíggjarbroytingar vóru á 25.256 tkr. Netto gevur hetta 21.878 tkr. Ársroknskapurin vísir eitt yvirskot á 4.506 tkr. Hetta gevur ein nettomun millum fíggjarætlan og roknskap á 26.384 tkr. Niðanfyri er útgreining av, hvussu hesin munur er nýttur:

**Broytingin er nýtt soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Broyting í áogn, peningi og aðrari skuld | 8.884 |
| Broyting í lániskuld | 0 |
| Broyting í gjaldføri | 17.500 |
| | 26.384 |

**Játtan og nýtsla**
10. Vísandi til høvuðsyvirlitið í ársroknskapinum fyri 2020 hjá Tvøroyrar kommunu og yvirlitið omanfyri, er nettomeirnýtsla staðfest á einari grein. Flestu greinir hava minninýtslu í mun til ætlanina. Meirnýtsla er m.a. staðfest í Almanna- og heilsumálum. Hetta kemst serliga av, at tað í 2019 hevur víst seg, at útreiðslurnar til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy vóru 899 tkr. hægri enn tað, sum kommunan hevði við í fíggjarætlanini fyri 2020. Í løgunum er meirnýtsla staðfest á einari grein. Talan er um Børn og ung, har meirnýtslan er viðvíkjandi nýggja barnagarðinum. Í inntøkunum er staðfest ein meirinntøka á 8.287 tkr.

**Fíggjarliga gongdin**
11. Samlaði raksturin hjá kommununi er í 2020 70.404 tkr., og er nakað hægri enn undanfarna ár, tá hann var 68.892 tkr. Hækkingin er á 2,2%. Inntøkurnar hjá kommununi eru á 89.216 tkr. og eru nakað hægri enn undanfarna ár, tá tær vóru 86.540 tkr. Hækkingin er á 3,1%. Á løgusíðuni hevur kommunan nýtt 14.306 tkr. í 2020 samanborið við 38.323 tkr. í 2019. Størstu løgurnar hava verið gjørdar á hesum økjunum: Barnagarðurin 3.691 tkr., Fólkaskúlin 1.116 tkr., Vatnverkið 1.172 tkr., Vegir 1.747 tkr., Maskinur og bilar 2.090 tkr. og Tvøroyrar havn 2.227 tkr.

***Samlað skuld í mun til álíkning***
26 Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettoskuld ultimo (tkr.) | -36.815 | -40.541 | -20.053 | -29.024 | -37.894 |
| Álíknaður skattur umr. til 23 % | 68.865 | 66.220 | 66.762 | 63.642 | 61.271 |
| Svarandi til álíkning | -0,53 | -0,61 | -0,30 | -0,46 | -0,62 |

Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum.

**<u>Fíggjarnevndin 03. juni 2021:</u>**
Rokniskapurin var gjørgnumgingin og einmælt samtyktur. Fíggjarnevndin mælir til at hildið verður fram við verandi grandskoðara.

**<u>Býráðið 03. juni 2021:</u>**
Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin 2020, og einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at halda fram við verandi grandskoðara.

Fundurin lokin kl. 17:10

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen